Ummæli:



# Ein cabarét in spc.

Einaferð var tað ein maður, sum at Rabelais. Tá hann á deyðastrá skuldi gera upp segði hann: »Eg eigi einki; eg skyldi nógv - restina kunnu tit geva teimum fátæku«.

Tað er okkurt av hesum beistaktiga og ósentimentala humor eg altíð havi sett í samband við fyribrigdi »Cabarét« - men tá eg í gjárkvøldi kom út úr Sjónleikarhúsinum eftir at hava sæð »Óla P. - ár 2000 á veg« hevði eg eina kenslu av, at í hvussu so er føroyskir kabarettsmiðjir royna at ganga tryggari leiðir enn tær rabelaisku. Heldur enn tað svarta skemtið og ta hvøssu satiruna hava høvundarnir valt at geva eina heldur spaka og meiri altfevnandi mynd av farandi og komandi tvørleikum. Men prísurin er ein skroypilig heild - hóast samanhangandi.

At eisini henda leiðin krevur bæði orku og dugna, tað er eyðsæð. Heilt frá fyrstu løtu í forhøllini við tí gátuføra kvæðinum hjá Jógvani Bærentsen og Knút Olsen til tað síðstu poetisku pallmyndina við orðum eftir Gunnari Hoydal, er hetta ein framførsla sum leiklistaliga er merkt av dygd.

Hilmar Joensen og Jógvan S. Joensen bera - ávikavist - tann eitt lítið sindur góðvarna og grátuliga og tann eitt lítið sindur ónda og falska føroyingin um aldargáttina og hetta gera teir trúliga. Og so kemur Palleba - tað ultimativa offrið fretliga framborðið av Tóra í Hoyvík - so hissini skreiðandi inn og út úr pallmyndini, men við frígerandi látri í hølunum.

Fleiri av stuttleikunum geva avdúkandi og stuttligar myndir av eitt nú eini forkelaðari fullveldisideologi, av tí altvalandi ríkisfelagsskapinum, av tí vanærisligu søguni um ta sadistisku Almammuna og av ð-sleikjarum og samleikasnobbum. Ímillum og umkring solosang og stutt-leikir er løgd ein stundum heldur einstáttað søga um kreppurakta føroyska fólkið, sum aftur aftur valdi teir somu korruptu politikkarnar. Men tað er sum um henda søgan ongantíð veruliga kemur í gongd og tað sama má eg tíverri siga um stutt-leikirnar: hetta eru meiri byrjanir og hugskot enn konsekvent gjøgnumførdar satirur. Av tí sama fái eg eisini eina kenslu av at tær vøkru og fimu dansarinnurnar bert hava leiklut sum eiggilig ífylla. Sum um høvundarnir ikki rættuliga kundu blíva samdir um hvussu sjussurin skuldi blandast: ein fullur og bersøgin Palleba, holdsligar cancangentur og/ella ein grátandi kreppuføroyingur balanserandi á keikantinum millum sjálvmorð og oljuvinnu.

*Tað sum situr í huganum, tá eg eftir lokna Cabarét gangi heim í friðarligum gøtum, er upplivingin av góðum tónleiki, sannførandi sangi, glitrandi symbolskum búnum og Gesti (Hallur Hjalgrímsson) sum við kropsmáli, mimikki og fáum orðum fær søgur og rørslur at hanga saman*

Tað sum situr í huganum, tá eg eftir lokna Cabarét gangi heim í friðarligum gøtum, er upplivingin av góðum tónleiki, sannførandi sangi, glitrandi symbolskum búnum og Gesti (Hallur Hjalgrímsson) sum við kropsmáli, mimikki og fáum orðum fær søgur og rørslur at hanga saman.

Men eg gangi við einum varhuga av onkrum tómleika. Er tað bitið, tað svarta skemtið og samfelagssatiran eg sakni? Ella er tað hetta at eg ikki reiðiliga skilji hví alt var samanskrúvað júst so sum tað var?

Var hetta kanska ov abstrakt til mín jarðbundna heila? Men her vóru leikarar, sangarar, tónleikarar og dansarar sum so sanniliga dugdu síni ting og eg dugi ikki at síggja annað enn at leikstjórarnir hava gjørt eitt sera gott arbeiði og at tomatsangurin kann liva sítt egna lív langt útum Sjónleikarhúsið og at... Á vegnum heim fari eg inn á Manhattan og drekki eitt glas av reyðvíni, men hetta loysir ikki mínar estetisku tvørleikar. Kanska er tað, sum Almannan hevði sagt tað, eg sjálvur sum eri trupulleikin?

**Rói Paturson**





# Eimskip víðkar um virksemið

*Gongst eftir ætlan, fer Runavíkar Kommuna undir at byggja nýggja farmahøll, sum skal leigast út til Eimskip*

Jákup Mørk

Í nøkur ár hevur Eimskip nú virkað her á landi, og alla tíðina hava teir spakuliga økt um virksemið, og samstundis, sum virksemið hjá felagnum er økt, hevur felagið spakuliga betra um hølisumstøðurnar heima á Eystaru Bryggju.

**Ikki endaliga avgreitt**

Higartil hevur alt virksemið hjá felagnum verið hýst í høvuðsstaðnum, men nú er so stig tikið til at víðkað enn meira um virksemið, soleiðis at felagið kann røkka enn størri part av landinum.

Sambært Jákup Lamhauge, býráðsformanni í Runavík, hevur Eimskip sett seg í samband við teir, við tað at felagið hevur havt í umbúnað at víðka um virksemið.

Framman undan hevur politikkurin hjá kommununi verið, at teir í størst møguligan mun vilja eiga teir virkisbygningar, sum eru í havnalagnum, fyri at teir á tann hátt kunnu hava eina betri stýring á aktivitetinum í kommununi.

Sambært Jákupi Lamhauge, er viðgerðin av málinum ikki liðug enn, men at býráðið í løtuni bíðar eftir einum svarið frá Eimskip, soleiðis at støða kann takast til um kommunan skal fara undir byggingina.

Náttúrlig menning

Eyðstein Jensen, sum er fíggjarleiðari hjá Eimskip í Føroyum, váttar fyri Sosialinum, at teir í løtuni arbeiða við hesum máli, og at ein leiguavtala við Runavíkar Kommunu liggur í luftini.

Enn er tó ikki komið á mál hesum viðvíkjandi, og løtuni verður tosað aftur og fram um, hvussu stórur ein møguligur bygningur skal verða, eins og tað ikki er greitt, hvar á havnarlagnum ein slíkur skal liggja.

Eyðstein sigur víðari, at eitt slíkt stig er ein náttúrlig menning í tí aktiviteti, sum felagið frammanundan hevur. Eisini leggur hann dent á, at ein slík betran av umstøðum felagsins sjálvandi vil viðføra, at sambandi til kundarnar og harvið tænastustøðið kann gerast betri.



*Gongst eftir ætlan, gongur ikki alt long tíð, áðrenn talið av virkisbygningum í Runavíkar Havn økjast enn meira*
***Savnsmynd***

# Grannahús fingu stóran skaða

*Við fáum daga millumbili fingu tvey sethús úti á Hamrinum á Argjum stóran skaða, tá ávíkavist vindur og flúgvandi grót gjørdu um seg. Tíbetur stóðst eingin fólkaskaði av hendingunum, men um illa vildi til, kundi lættliga enda galið*



*Tekjan á sethúsunum fekk nakað av skaða, orsakað av grótinum, men lukkutíð stóðst eingin fólkaskaðið av hendingini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Jákup Mørk

Í illveðrinum nýggjársdag, vóru hvirlurnar somikið harðar, at tekjan varð rivin av einum sethúsum úti á Hamrinum á Argjum.

Tað var stutt fyri døgurðatíð, at brandstøðin í Havn fekk boð um skaðan, og beinanvegin vórðu boð send eftir sløkkiliðsmonnunum, við tað at tekjan var til miklan ampa.

Skjótt varð borið at, og eftir stuttari løtu høvdu sløkkiliðsmenninir fingið tamarhald á støðuni.

Orsøkin, til at tekjan feyk av vindinum, hevur helst verið, at elementini til húsini júst vóru sett upp, og at hesi helst ikki hava verið fest nóg væl.

**Eingin friður**

Okkum kunnugt, so var hetta einasti vindskaðin, sum hendi hendan dagin.

Friðurin úti á Hamrinum vardi tó ikki leingi, tílongu týsdagin var aftur galið, tá eini hús á somu gøtu fingu skaða.

Hesu ferðina var tað tó ikki veðrið, sum gjørdi um seg, men hetta gjørdi ikki skaðan minni.

Talan var nevnliga um eina spreinging í grannalagnum, sum viðførdi at smásteinar komu sendandi yvir tekjuna á einum sethúsum við tí úrsliti, at tekjan fekk stóran skaða. Umframt at sjálvt grótið kom sendandi oman yvir tekjuna, endaði sjálvur gummidekningurin eisini á tekjuni, so tað er greitt, at nógv hevur staðið á.

**Kundi endað galið**

Einki er at taka seg aftur í, at um fólk hevði verið fyri, tá grótið kom flúgvandi, kundi óbótaligur skaði staðist av hesum, men lukkutíð var eingin fyri.

Sjálv húsini fingu annars rættuliga stóran skaða, við tað at fleiri sperrur undir tekjuni brotnaðu, eins og veggir o.a. hava skotið seg nakað orsakað av stóra trýstinum.

Júst hvør orsøkin til spreingiskaðan, er ikki greitt enn.

Eftir tí, sum vit hava frætt frá brandstøðini, fór alt fram á rættan hátt, áðrenn sprongt varð, soleiðis at dekningur o.a. var í lagi.

Møguliga hevur talan verið um sterkari dynamitt enn vanligt, men í øllum førum tykist tað vera greitt, at krútið hevur verið eitt sindur sterkari enn tað, sum vit vanliga seta í samband við hesa ársins tíð.



*Vindurin nýggjársdag var somikið harður, at tekjan reiv av einum húsum úti á Hamrinum á Argjum. Sum tað sæst á myndini, so kundi skaðin verið enn størri, um sløkkiliðsmenninir ikki bóru so skjótt at*
*Mynd: Álvur Haraldsen*